gult cyan magenta svart

Fer at fáa álvarsligar avlei›ingar

Fakfeløgini fara at seta tiltøkí í verk, sum fara at fáa álvarsligar avlei›ingar, um Bjarni Djurholm leggur eitt n‡tt uppskot fyri tingi› um, hvussu ósemjur á arbei›smarkna›inum skulu loysast

ARBEI‹S-MARKNA‹UR
Áki Bertholdsen



-Ta›, sum Vinnumálast‡ri› nú ætlar, fer at taka grundarlagi› undan fakfeløgunum og ta› ver›ur undir ongum umstø›um gó›tiki›, sigur Sjeymannabólkurin, sum umbo›ar at kalla allan tann føroyska arbei›smarkna›in

Fakfeløgini á føroyska arbei›smarkna›inum hava tiki› ta› sum eina rættiliga krígsavbjó›ing, at Vinnumálast‡ri› nú hevur or›a› eitt uppskot, sum skal leggjast fyri tingi› um, hvussu ósemjur á arbei›smarkna›inum skulu loysast.

Tey siga, at tey fara undir ongum umstø›um at gó›taka, at uppskoti› ver›ur lagt fyri tingi›, solei›is sum ta› nú er or›a›.

Sjeymannabólkurin, sum umbo›ar at kalla allan tann føroyska arbei›smarkna›in, hev›i fund um máli› hósdagin.

Og har samtykti tey at vísa uppskotinum aftur vi› rættiliga avgjørdum or›ingum.

Aftaná fundin siga tey, at tey meta uppskoti› so miki› álvarsligrt, at ver›ur ta› lagt fyri tingi›, fara tey at seta tiltøk í verk, sum fara at fáa rættilgia álvarasligar avlei›ingar, bæ›i fyri privata og fyri almenna arbei›smarkna›in.

Missa samrá›ingarrættin

Ta› eru serliga ávísir partar í uppskotinum, sum fakfeløgini halda ganga teimum so nær, at ta› kann ikki gó›takast.

– Hetta er eitt uppskot, sum fer at taka samrá›ingarrættin frá fakfeløgunum og ta› ver›ur undir ongum umstø›um gó›tiki›. Tey siga, at eitt nú fær semingsma›urin at kalla óavmarka›ar heimildir til at útseta arbei›sste›gir. Tey siga, at eftir samrá› vi› partarnar skal semingsma›urin áseta freistina fyri, nær partarnir í eini trætu skulu hava svara› einum semingsuppskoti.

– Sostatt kunnu vit koma í ta› stø›u, at vit kunnu ikki fara í verkfall fyrrenn eitt hálvt ár, ella kanska longri, aftaná at semingsma›urin hevur lagt semingsuppskot fram, alt eftir, hvussu langa freist hann setir.

Tey siga, at semingsma›urin fær eisini tilvidarliga heimild til at útseta verkfall um ein arbei›sste›gur, eftir hansara tykki, hev›i havt ví›tóknar avlei›ingar fyri samfelagi›, ella avger›andi óhepnar avlei›ingar fyri royndirnar at enda strí›i› uttan at fara í arbei›sste›g. Feløgini vísa eisini á, at eftir n‡ggja uppskotinum, ver›ur ta› eisini at kalla ógjørligt hjá fakfeløgunum at fella eitt semingsuppskot.

Sum er, ver›ur lagnan hjá einum semingsuppskoti› avgjørt vi› vanligum meiriluta. Men eftir n‡ggja uppskotinum, skulu minst 75% av teimum, sum hava atkvø›urætt, taka lut í atkvø›ugrei›sluni. Og av teimum skulu so yvir 50% ver›a ímóti einum semingsuppskoti, fyri at fella ta›.

Provokatión

Sjeymannabólkurin sigur, at hetta er ein provokatión ímóti fakfeløgunum, sum tey har›liga mótmæla.

Tey halda eisini, at hetta vísir eina slíka vanvir›ing ímóti feløgunum, at ta› má átalast har›liga.

Tey siga, at hetta er ein roynd at seta danskar reglar í gildi í Føroyum.

Tey sipa til reglarnar í lógunum um høvu›savtalu, um arbei›srætt og um seming.

Men tey leggja dent á, at í Danmark samtykti Fólktingi› hesar tríggjar lógirnar, eftir at partarnir á arbei›smarkna›inum vóru samdir um, at tær skuldu setast í verk.

– Men slíka vir›ing vísir Vinnumálast‡ri› ikki fyri pørtunum á arbei›smarkna›inum í Føroyum, tí her er ta› ætlanin at fáa Løgtingi› einvíst at seta hesar reglar í gildi›, uttan at spyrja partarnar á arbei›smarkna›inum.

Vilja hava svar í hesi vikuni

Tey føroysku fakfeløgini vilja nú hava at vita, hvør eru vinur og hvør er fíggindi.Og heitt ver›ur á flokkarnir um at svara í hesi vikuni, tí máli› hevur skund

Fakfeløgini vilja hava at vita, hvørjir flokkar á tingi› taka undir vi › einum uppskoti frá Vinnumálast‡rinum, sum tey siga, fer at skerja taka samrá›ingarrættin frá feløgunum

ARBEI‹S-MARKNA‹UR
Áki Bertholdsen

Fakfeløgini á føroyska arbei›smarkan›inum vilja nú hava at vita frá teimum politisku flokkunum, hvør er vinur og hvør er fíggindini í sambandi vi› eitt suppskot, sum Vinnumálast‡ri› hevur or›a› um, hvussu ósemjur á arbei›smarkna›inum skulu loysast framyvir.

Sum ta› sæst í grein a›rasta›ni í bla›num, hava fakfeløgini sent Vinnumálast‡rinum eina hvassa átalu og eina ávaring um, at ver›ur uppskoti› lagt fyri tingi›, sum ta› nú er or›a›, ver›a tiltøk sett í verk, sum fara at fáa álvarsligar avlei›ingar.

Men á fundi í Sjeymannabólkinum hósdagin samdust feløgini eisini um at spyrja teir politisku flokkarnar, hvør teirra stø›a er í hesum máli.

Feløgini halda, at ætla›a uppskoti› er so fakfelagsfíggindaligt, at tey undrast yvir, at ongin flokkur í samgonguni hevur tala› at.

– Vit undrast eisini á, at Vinnumálast‡ri› saman vi› lønardeildini ikki vir›a samrá›ingarrættin hjá føroysku fakfeløgunum, siga feløgini. Tey halda nevniliga, at lønardeildin hevur havt eitt stórt or› at siga, tá i› uppskoti› var› or›a› og at ta› i helst er meiri enn tann eini flokkurin, sum Bjarni Djurholm er í, fólkaflokkurin, sum stendur aftanfyri hesa ætlanina.

Ta›, sum ætlanin er at leggja fyri tingi›, er fyri ein part avskriftir úr donskum lógum, siga feløgini. Men hesar lógirnar eru settar í gildi› í Danmark eftir avtalur ímillum partarnar á danska arbei›smarkna›inum

– Vit fara sta›iliga at heita á politisku flokkarnar á tingi, um at vísa aftur hesari ódámligu roynd at leggja seg út í samrá›ingarrætt okkara, siga fakfeløgini.

Svar í vikuni

Sjeymannabólkurinsigur, at fyri fakfeløgini hevur ta› t‡dning at fáa grei›u á hvørjir flokkar stu›la grundleggjandi rættindi hjá fakfeløgunum, og, hvørjir flokkar eru sinna›ir at seta til viks grundleggjandi demokratiska rættin hjá fakfeløgunum at samrá›ast um vi›urskiftini á føroyska arbei›smarkna›inum.

Tey heita tí á hvønn einstakan flokk á tingi um skrivliga at bo›a feløgunum frá, um teir taka undir vi› hesum n‡ggja uppskotinum, sum Vinnumálast‡ri› hevur or›a› um seming á arbei›smarkna›inum, ella .

Teir flokkar, sum taka undir vi› tí, ver›a eisini bidnir um at grundgeva fyri hesari stø›uni.

– Fyri fakfeløgini, og ikki minst fyri limir okkara, hevur ta› t‡dning at fáa grei›u á, hvar politisku flokkarnir á tingi standa í hesum máli, sigur sjeymannabólkurin.

Sjeymannabólkurinsigur, at hann ætlar at kunngera fyri limunum í fakfeløgunum, hvørja stø›u teir ymisku flokkarnir hava, og eisini um tann einstaki fólkavaldi politikarin er fyri at føra avskriva›ar danskar lógir í føroyskan arbei›srætt, og vi› hesum beinlei›is leggja seg út í samrá›ingarræt okkara.

Feløgini siga, at máli› hevur skund og tí vóna tey at frætta aftur frá flokkunum í hesi vikuni.

gult cyan magenta svart

Fólk n‡ta skil

Vikuskifti› hevur veri› stak fri›aligt, ver›ur sagt av politistø›unum kring landi›. Fólk, sum hava veri› í jólaveitslum, fer›ast vi› bussi aftur og fram

LØGREGLU-FRÁGREI›ING
Edvard Joensen

Løgreglan ger nógvar fer›slukanningar í hesum døgum

Savnsmynd

Hóast nógv fólk hevur vri› á fer› um vikuskifti›, hevur ta› veri› stak fri›aligt kring landi›, siga politifrágrei›ingarnar hjá ymsu stø›unum. Fólk n‡ta skil og fara ikki vi› bili, tá tey ætla sær í veitslu.

Av politistø›ini í Runavík ver›ur sagt, at at hóast løgreglumenninir, sum hava veri› á vakt um vikuskifti›, hava kanna› rættiliga nógvar bilar, hava fólk ikki koyrt ávirka›. Vi › trimum undantøkum kortini.

Fríggjakvøldi› var› ein bilførari tikin fyri at koyra ávirka›ur, og ein annar fall fyri sama mistakinum sunnumorgunin.

Annars var› ein ma›ur tikin seinnapartin leygardagin, eftir at hann var r‡mdur frá einum lítlum fer›sluóhappi í Saltangará. Ma›urin var rættiliga ávirka›ur, og fær eina heilsu frá fútanum fyri ta›.

Nógv fólk hevur fer›ast til og frá jólaveitslum hesi vikuskiftini, sum farin eru, sigur løgreglan í Runavík. Bæ›i í Eysturoynni og eysturoyingar, sum eitt nú eru farnir til Havnar at ballast. Men fólk eru so miki› skilagó›, at tey fer›ast kollektivt. Og ta› er avgjørt ein fyrimunur fyri trygdina.

Sama er galdandi a›rasta›ni. Eitt nú i Vágum hava fleiri tiltøk veri› seinastu tvær vikurnar. Og eisini har koyra náttbussar, sum fólk brúka dúgliga.

Annars hava náttbussarnir í Vágum koyrt í fleiri ár, og undirtøkan er gó›, frættist vestaneftir. Ta› eru bussarnir á Giljanesi, sum koyra náttarkoyringina har vesturi.

Einasta, sum komi› erat standa í frágrei›ingini, sigur vakthavandi, er at onkur helst hevur veri› eitt sindur svangur um vikuskifti› og hjálpt onkrum fiskatræi av vi› nakrar ræstar greipur.

Úr Su›uroynni ver›ur sagt, at har hendi hvørki eitt ella anna›, og eisini í Nor›oyggjum var sera fri›arligt, ver›ur sagt av politistø›ini í Klaksvík.

Okkurt pinkalíti› fer›sluóhapp, har onkur smávegis bugla stó›st av, er ta›, løgreglan í Klaksvík hevur at skriva um. Og so var onkur lítil ósemja millum mann og konu.

Í Havn var eisini rættiliga nógv fólk úti um vikuskifti›, og ikki øll vunnu hús uppaftur. Átta mans hava sovi› á politistø›ini um vikuskifti›.

Leygarnáttina tók løgreglan ein ávirka›an bilførara, og sunnunáttina endurtók søgan seg, tó vi› ø›rum leikara.

Annars var okkurt herverk framt, sigur vakthavandi á politistø›ini í Havn. Millum anna› vór›u rútar brotnir í bygninginum hjá trolvirkinum Vónini í Álakeri.

Men sum heild var vikuskifti› stak fri›aligt, ver›ur sagt úr øllum landinum.

Broyta mannagongdina

Farmadeildin hjá Strandfaraskipum Landsins b‡›ur sær til at samskipa flutningin av flogfrakt millum flogvøllin og farstø›ina í Havn.

Sum er, eru fleiri flutningsfeløg, sum átaka sær at flyta flogfrakt av flogvøllinum beinlei›is út til kundan.

Ta› fer fram á tann hátt, at feløgini koma hvørt vi› sínum bili út á flogvøllin, tá flogfari› lendir, og fara sí›an avsta› aftur hvørt vi› sínum parti av farminum.

Hetta hevur ávísa tro›kan vi› sær. Bæ›i á flogvøllinum og ikki minst í bí›irø›ini vi› ferjulegurnar í Vestmanna og á Oyrargjógv.

Strandfer›slan hevur farmastø› á flogvøllinum og b‡›ur sær nú til at taka sær av at flyta allan flogfarmin til Havnar, har flutningsfeløgini sí›an kunnu taka í móti og flyta út til kundarnar.

Ta› hevur fleiri fyrimunir vi› sær, heldur Heini á Borg, lei›ari á farmadeildini.

Í fyrsta lagi slepst undan øllum bilunum á flogvøllinum, og í ø›rum lagi lættir ta› munandi um tr‡sti› um Vestmannasund, um bara ein bilur kemur vi› øllum farminum og flytur hann á farstø›ina í Havn.

Men enn er einki avgjørt í hesum máli. Arbeitt ver›ur vi› tí, sigur Heini á Borg. Hetta er eitt tilbo›, Strandfer›slan er komin vi›, og samrá›ingar eru nú vi› flutningsfeløgini.

Vónandi kemur ein loysn einafer› í januar, sigur Heini á Borg.

ej